## Ítróttargalla í Runavík

Leygarkvøldið 3. mars verður skipað fyri ítróttargalla í Runavík. Tey feløg, sum taka lut í gallakvøldinum, ið Runavíkar Kommuna stendur fyri, eru Tjaldur, NSÍ, Kappróðrarfelagið NSÍ, Støkk og Skála. Hetta er triðja árið, at kvøldið verður hildið, og sum skilst hava hini kvøldini verið serstakliga væleydnað.

## Man U. og Chelsea vunnu

Oddaliðini í ensku Premier League greiddu sína skyldu, tá tey vóru í dysti mikukvøldið. Manchester United hevði vitjan av Watford, og við málum frá Ronaldo, Rooney, Larsson og einum sjálvmáli vann Manchester tryggan 4-0 sigur. Chelsea, sum er seks stig aftan fyri oddaliðið, vann 3-0 á heimavølli móti Blackburn. Drogba, Lampard og Kalou skoraðu málini hjá meistarunum. Aðrastaðni spældu Bolton og Charlton javnleik 1-1, meðan Newcastle vann 3-1 á Aston Villa.




# Danmark á dreymaferð

**Ikki vóru nógv, sum væntaðu eitt hálvfinalupláss til danska manslandsliðið í hondbólti, men nú er dreymurin vorðin veruleiki. Á veg ímóti finaluni hava teir bast m.ø. heimsmeistarunum, og tí er als ikki óhugsandi, at danir kunnu fara allan vegin**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*Nógvir danir hildu ondini, tá Joachim Boldsen mátti av vøllinum ímóti Íslandi við skaða. Boldsen hevur tó meldað seg kláran aftur, og hetta hevur økt um donsku vónirnar.*

Danmark var undan HM-endaspælinum í honbólti hjá monnum mett at vera millum sterku liðini í endaspælinum, men statistikkurin var ikki við teimum. Ikki síðani 1982 hevur Danmark megnað at spælt seg til hálvfinalurnar í einum HM-endaspælið, og tí vóru nógv sum væntaðu, at Danmark enn einaferð fór at floppa.

Í innleiðandi bólkinum var eisini nær við, at Danmark reyk út. Eftir eitt óvæntað og helst eisini óneyðugt tap fyri Ungarn, máttu danir út í ein altavgerandi dyst ímóti Noreg, sum skuldi vinnast, um teir ætlaðu sær víðari. Danmark vann dystin við tveimum málum, og so vóru teir klárir til millumspælið.

### Sigurin á heimsmeistarunum legði grundina

Í millumspælinum legði Danmark út við at tapa fyri olympisku meistarunum, Kroatia, men eftir hetta kom gongd á. Fyrst vunnu teir á heimsmeistarunum úr Spania, og hetta gjørdist byrjanin til nakað stórt. Eftir hetta tryggjaðu teir sær víðari luttøku til fjórðingsfinalurnar, tá teir vunnu á Russlandi, og í síðsta dystinum í millumspælinum vunnu teir enn einaferð. Hesa ferð var dysturin ímóti Kekkia, og við trimum sigrum á rað eydnaðist Danmark at koma uppá annað pláss, sum gjørdi, at teir skuldu møta Íslandi í fjórðingsfinaluna, og so var lagt upp til eitt stórt norðurlendskt hondbóltsbrak.

Sum flest øllum kunnugt, so vann Danmark fjórðingsfinaluna ímóti Íslandi eftir ein sera dramatiskan dyst, har liðini máttu út í longda leiktíð, áðrenn Lars Møller Madsen tryggjaði Danmark sigurin í seinasta sekundinum.

### Traktorurin er klárur

Eftir sjey minuttir av dystinum ímillum Danmark og Ísland mundu nógvir danir halda ondini heima í stovunum. Tá small stóra stjørnan á danska landsliðnum, Joachim Boldsen, í gólvið. Traktorurin, sum hann verður róptur, tók seg til knæðið, og her sá ikki gott út. Boldsen noyddist av vøllinum, og hann kom ongantíð innaftur í dystin.

Ein dag eftir íslandsdystin hevur hann tó melda seg kláran til hálvfinaluna ímóti Póllandi. Boldsen segði, at hann bert hevði fingið eitt hart slag yvir knæðið, og tí hevði hann so ilt undir dystinum. Hetta eru sanniliga góðar nýggjheitir fyri danir. Boldsen er nevniliga stóra stjørnan á liðnum, og uttan hann, so tykist danska liðið ikki koyra heilt optimalt. Í dystinum ímóti Íslandi tóktist saknurin í serliga verjupartinum at vera sera stórur.

Nú sigur traktorurin seg tó vera kláran aftur, og hetta er heilt sikkurt við til at økja um vónirnar hjá dønum. Nú ætla teir sær í finaluna um heimsmeistaraheitið.

# Pólland hevur tikið øll á bóli

**Pólland hevur tikið øll á bóli í HM-endaspælinum hjá monnum. Teir vóru væntaðir at koma víðari til millumspælið, men at teir skuldu koma allan vegin til hálvfinaluna høvdu bert tey mest bjartskygdu væntað**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hevði nakar sagt undan HM-endaspælinum, at Pólland fór at koma til hálvfinalurnar, so høvdu tað helst vera mong, sum smílandi høvdu rist við høvdinum. Pólland var stutt og greitt ikki mett at vera nóg gott at røkka til hálvfinalurnar, men hetta løgdu teir líka í.

Frá fyrsta dysti hava teir víst, at teir veruliga hoyra heima í tí finasta selskapinum. Í innleiðandi bólkinum løgdu teir út við at vinna trygt á bæði Brasiliga og Argentina. Í síðsta innleiðandi dystinum skuldu teir møta vertunum úr Týsklandi, og her var ikki mett, at Pólland fór at klára at standa ímóti týska trýstinum, men í hesum dystinum vísti Pólland fyri fyrstu ferð, at teir kunnu klára seg ímóti teimum bestu. Teir vunnu nevniliga dystin framman fyri týskum áskoðarum í túsundaali, og sosatt vunnu teir sín innleiðandi bólk.

### Pólland vann sítt millumumfar

Í fyrsta dystinum í millumumfarinum tapti Pólland sín fyrsta og higartil einasta dyst í endaspælinum. Í dystinum ímóti fronsku evropameistarunum fingu pólverjarnir veruliga oyruni í maskinuna, og teir blivu stutt sagt avbukaðir. Í næsta dystinum vunnu teir tepurt á Íslandi, og so vóru teir komnir í gongd. Síðstu tveir dystirnar í millumumfarinum vóru ímóti ávikavist Tunesia og Slovenia, og hesar báðar dystirnar vunnu póllendingar uttan stórvegis hóvasták. Sostatt slapp Pólland víðari úr millumumfarinum, sum vinnari av bólkinum, og nú bíðaði Russland í fjórðingsfinaluni.

Hesin dysturin gjørdist sera javnur og spennandi. Í fyrra hálvleiki førdi Pólland fleiri ferðir rættiliga sannførandi, men hvørja ferð megnaðu russar at koma inn aftur í dystin. Í seinna hálvleiki kom tó rættiligur spenningur í dystin, og at enda gjørdist munurin bara tað eina málið í millum liðini. Pólland hevði tó vunnið, og so vóru teir klárir til hálvfinalurnar.

### Sera gott lið

Pólland er samansett av nøkrum sera góðum og evnaríkum leikarum. Serliga ein teirra hevur spælt sera væl í HM-endaspælinum. Her er talan um vinstra bakkin Karol Bielecki, sum spælir í týska felagnum, Magdeburg. Hann er 202 cm langur, og sleppur hann fyrst upp at hanga frammanfyri verjuna, so er hann næstan ómøguligar at steðga.

Málverjin, Slawomir Szmal, er eisini eitt av mest týðandi vápnunum hjá Póllandi, og í fjórðingsfinaluni ímóti Russlandi tók hann ikki færri enn fimm brotskøst, og sostatt gjørdist hann hetjan hjá Póllandi.




*Karol Bielecki hevur helst verið størsta stjørnan hjá Póllandi í ár. Sleppur hann ótarnaður inn ímóti verjuni at skjóta, so er hann ringur at steðga.*

Trupulleikin hjá Póllandi er breiddin. Teir hava ikki so nógvar leikarar at taka av, sum onkur av hinum londum, og í longdini kann hetta koma at kosta. Higartil hava teir klára seg, og nú er spurningurin, um Pólland megnar at fara allan vegin.